# Broytingar í Serstøku Byggisamtyktini fyri Árnafjørð

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mei 1954 við seinni broytingum, at Klaksvíkar Býráð hevur samtykt hesar broytingar í Serstøku Byggisamtyktini fyri Árnafjørð:

21. juni 2005: Ásetingarnar fyri økispart C3/2 í Árnafirði verða broyttar soleiðis at møguleiki verður at frábýta til neystagrundir. - Loyvt skal verða at nýta loft ella yvirhædd til summarbýli

24. nov. 2005: Ásetingar fyri økispart B2/ 2 í Árnafirði verða broyttar soleiðis, at møguleiki verður at frábýta til tey í byggisamtyktini ætlaðu endamál.

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni inntil 20. januar 2006 og eru somuleiðis at síggja á www.klaksvik.fo

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi seinasta lagi 17. mars 2006 fyri at koma við í býráðsins endaligu viðgerð av broytingini.

Klaksvík 16.desember 2005

**Klaksvíkar Býráð**

# Hallarvørður

Tvøroyrar býráð søkir eftir hallarvørði til skúla- og ítróttarhøllina í Trongisvági.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**

- at skipa fyri øllum tiltøkum í høll/forhøll og skúlagarði.
- at leiga høll/forhøll og skúlagarð út.
- at vaska høll/forhøll og skúlagarð.
- at hava umsjón við umklæðingarúmum og wc'um.
- at gera umvælingar.
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskifti eru í lagi.
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum.
- at halda reint og ruddiligt inni og uttanum høllina.

**Førleikakrøv**
Skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast tilber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til teknisku deild hjá Tvøroyar býráð á tlf. 371085

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tvøroyrar býráð, postrúm 85, 800 Tvøroyri í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 23. desember 2005. Merkið brævbjálvan: **Hallarvørður.**

# Broytingar í Almennu Byggisamtyktini í Klaksvíkar Kommunu

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mei 1954 við seinni broytingum , at Klaksvíkar Býráð hevur samtykt hesar broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar Kommunu:

27.okt. 2005: 4.grundlendi (landbúnaðarøki) við bátahylin í Borðoyavík verður útlagt sum B 2.4 og B 2.5, sum er havna- og ídnaðarøki

27.okt. 2005: Ásetingarnar viðv. grundøkjavídd í økisparti B 8 (ídnaðarøkið við Borðoyarvík) verða broyttar

27.apr. 2004: B 10-økið á Strond (Grótbrotið) verður víðkað og ásetingarnar broyttar og útgreinaðar

24.nov. 2005: B 1 økið í Ánunum (Ídnaðar- og Góðshavnin) verður býtt sundur til B 1.2 og B 1.3 við broyttum ásetingum í mun til verandi B1-øki

21.juni 2005: Ásetingin viðvíkjandi uppbýti av norðasta partinum av serstøku byggisamtyktini í 1.grundlendi niðanfyri Klaksvíksvegin verður broytt.

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni inntil 20. januar 2006 og eru somuleiðis at síggja á www.klaksvik.fo.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi seinasta lagi 17. mars 2006 fyri at koma við í býráðsins endaligu viðgerð av broytingini.

Klaksvík 16. desember 2005

**Klaksvíkar Býráð**

# Kunngerð um býráðsfundir 2006

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at almennu býráðsfundirnir fyri ár **2006** verða hildnir hesar **hósdagar kl. 16.30** í býráðssalinum. Tó verður fundurin 27. apríl hildin á Kambsdali og fundurin 31. august á Hellunum.

| | |
|---|---|
| 26. januar | 23. februar |
| 30. mars | 27. apríl |
| 1. juni | 29. juni |
| 31. august | 28. september |
| 26. oktober | 30. november |
| 14. desember | |

Fuglafjørður, tann 15. desember 2005

**Fuglafjarðar býráð**

# Almennu býráðsfundirnir

Føstu almennu býráðsfundirnir hjá Klaksvíkar kommunu ár 2006 verða hesir:

| | |
|---|---|
| 24. januar | 21. februar |
| 21. mars | 25. apríl |
| 23. mai | 27. juni |
| 19. september | 24. oktober |
| 21. november | 19. desember |

**Klaksvíkar Býráð**

# Aðalfundur

Verður í Norðurlandahúsinum, mikudagin **tann 28. desember kl. 10.00 við hesi dagsskrá:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi
4. Val av nevndarlimum og eykalimum
5. Val av grannskoðara og tiltaksmanni
6. Ásetan av limagjaldi og formansløn
7. Ymiskt

Gestarøðari verður Thormund Johannesen, skipsverkfrøðingur.

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

# Fólk søkist

Fólk søkist til at arbeiða í kafeteriuni í Høllini á Hálsi.

Àhugað kunnu venda sær til Dánjal Samuelsen, tlf. 521475.

**Tórshavnar ítróttar- og Samkomuhøll**

**Vit ynskja viðskiftafólki okkara, vinum og kenningum, eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað 2006, við tøkk fyri tað skjótt farna ár.**

**Samstundis siga vit frá, at farið verður í jólafrí frá mánadegnum 19. desember til mánadagin 2. januar 2006**

**við heilsan**

**K.T.D. Elektro**
**Bosch Service**
**v/Kára T. Djurhuus**
**410 Kollafjørður**

# VASKIFÓLK YNSKIST

**eitt vaskifólk ynskist til vask 2 ferðir um vikuna í Havn**

**Tel 21 88 11**